·FØROYA·
SOCIAL·DEMOKRAT

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐURSKAPUR

Nr. 45. | Lýsingaprísur fyri petitreglu: 30 oyr. á forsiðuni, 20 oyr. á 3. og 4. siðu. Við størri lýsingum fæst avsláttur í prisinum. | Leygardagin 6. november 1937. | Kostar kr. 1,50 fjórðingsárið + Porto. Blaðið verður bílagt á posthúsinum, brævsavnarstøðum og skrivstovuni. Telf. 143. | 11. árg.

Kraftsamlan

ella

syndran í einstaklingsins evnaloysi og ómagaskapi?

Leingi bardust javnaðarmenn fyri einari planøkonomiskari skipan av okkara fiskasølu uttan at fáa tað at kvinka úr botni.

Men so troðkaði lívsins rák so hart á, at knappliga losnaði - og afturhaldið brotnaði, og hitt fyrsta stigið varð tikið, og Føroya Fiskaexport, hin stóra landscentraliseringin, varð sett á stovn, tó ikki fullfíggjað og heilt út demokratisk skipað.

Javnaðarmenn hava í ár á tingi krav um, at næsta líka so neyðturviliga stig verður tikið. - Teir krevja eina centralisering av keypinum av okkara útgerðarvørum, og at ikki bara reiðararnir, men eisini fiskimenninir og Føroya løgting fáa umboðsmenn í stjórn Føroya Fiskaexports.

Vilja Føroya løgting og Føroya Fiskaexport taka undir við hesum stórmáli?

Íggjognum árini elvdu javnaðarmenn mótstøðumonnum sínum beiskar ónáðir við kravinum um at fáa eina sølu- og innkeypsmiðstoðu í Føroyum. Tað tóktist, sum okkara heiðraðu andróðursflokkar uttan mun til landsins gagn hovdu bitið seg fastan í einari »kraftstoðu«: **vær mótmælum hesum kravi javnaðarmanna!**

Men tolin trívst, og hin áhaldni sigrar at enda.

— Andróðursmenninir máttu boyggja seg fyri lívsins sterka kravi. Sølumiðstoða fyri útflytan av okkara salt- og klippfiski varð stovnað.

Men tessverri orkaðu menn bert at ganga hálva leið. Hin partin av javnaðarmanna kravinum, at centralisera alt okkara innkeyp og harvið spara landinum í hundrað túsundir av krónum árliga, hann varð ikki tikin við. Og heldur ikki varð skipað so fyri, at tað av sonnum kundi sigast, at allir í fiskivinnuni interesseraðir flokkar vóru umboðaðir í stjórnini fyri hesi kraftsamlan.

Eftiri er so statt at ganga leiðina fult út, og hava tessvegna javnaðarmenn í ár á tingi kravið um at skipa so fyri, at allar okkara útgerðarvørur, ið nú verða keyptar í smáum og harav eru dýrar og ofta undir ómagatreytum, megu verða keyptar í stórum, undir einum, annaðhvørt av løgtinginum við einum einkarhandli ella av Føroya Fiskaexport.

Tað er hvørjum skilamanni eyðsýnligt, at landið sum heild vinnur hundraðir av túsundum hervið.

Verða okkara álitismenn framvegis andróðursmenn?

Partamenn okkara

kring um Føroyar senda tíðint brøv til undirritaða og aðrar javnaðartingmenn viðvíkjandi ymiskum almennum viðurskiftum, serliga slíkum, sum tingið hevur til viðgerðar. Tað er sera forvitnisligt og gagnsligt fyri okkum, sum her á tingi skulu taka stoðu til tey ymisku mál, at frætta, hvat partamenn okkara úti um landið hava at seta fram, og hvussu teir meta tey ymisku viðurskifti.

Vit eru tí mikið takksamir fyri slík brøv og biðja partamenn okkara endiliga halda áfram við at framseta sína hugsan viðvíkjandi teim ymisku spurningum.

Eitt av teim málum, sum fleiri partamenn hava umtalað, er undirgrundin. Harum eru allir á einum máli, at tað allmenna, t. v. s. Løgtingið, má eiga heilan — óskerdan — nýtslurætt til alt tað, sum finnst í Føroya undirgrund. At eigararnir fáa part í eini møguligari konsessjónaravgift er rímiligt.

Tað er gleðiligt, at allir okkara partamenn eru samdir um tað; tí tað er tað einasta rætta.

Tað er harmuligt, at menn, sum bæði tíðliga og seint hava rósað sær av teirra kærleika til Føroyar, og rópað upp um, hvussu nógv gott teir unna Føroya fólki og Føroya løgtingi, nú tá umræður, stovna felog og skriva adressir ímóti Løgtinginum. Nú vilja teir, at tann privati ognarrætturin skal eiga alt. Men tað má ikki henda — tað stendst hvat av,ið má. Tí tað vil verða tann størsti meinbogi fyri øll framtok í landi okkara, — arbeiðsklassin — hin ognarleysi — verður tá fullkomiliga rættsleysur. Aðraleiðis verður, tá Løgtingið ræður, — tað skilja øll.

Nakrir partamenn okkara hava umtalað »Føroya Kol«.

Ein maður skrivar t. d. soleiðis: »Eg kann ikki hugsa mær, at javnaðarmenn verða við til at geva einarætt til »Føroya Kol« ella aðrar privatkapitalistar. Nakað annað er, at hitt almenna — um tað ikki er fórt fyri sjálvt at seta fyritøkur á stovn — gevur »konsessjónir« fyri eitt áramál til felog ella menn«.

Eg vóni, at allir partamenn okkara eru greiðir yvir, at vit javnaðartingmenn ikki verða við til at geva hesum ella nøkrum privatkapitalistiskum felagi slíkan rætt, at tað skerjir Føroya løgting ella Føroya arbeiðarar. Men Løgtingið hevur neyvan tann pening,ið torvast fyri at stovna slíkar fyritøkur. Hava kommununrnar ráð? Neyvan. Heldur nøkur kommuna ella nakað arbeiðsmannafelag seg foran fyri at stovna minudrift í síni bygd, biðist viðkomandi venda sær til tingið nú beinan vegin, áðrenn sakin verður avgjørd.

Kann tingið ikki — og kunna Føroya arbeiðsmannafelog ella kommunur ikki gera nakað, verður alt liggjandi í Føroya undirgrund, sum tað hevur ligið í milliónir av árum — ongan til gagns. Tað má ikki ske. Tá má tingið heldur geva konsessjón fyri eitt áramál til eitt ella fleiri felog við treytum, ið gagna arbeiðarum og landinum sum heild mest.

Spurningurin er so: Skal eitt ella fleiri felog fáa konsessjónina?

Hvat halda okkara partamenn úti um landið um hetta?

Vit javnaðartingmenn hava samráðst um hetta og eru komnir til hesa niðurstoðu:

Fleiri felog, sum kappast hvørt við annað, og tessvegna verða liggjandi á knøunum, verða aldri at kunna hjálpa Føroya arbeiðarum til betri livikor.

Eisini er minudrift eitt so lívsfarligt arbeið, at vit ikki kunna forsvara at lata tað fara fram uttan minulógin verður yvirhildin, t. v. s., at minurnar verða soleiðis skorðaðar av, at allur vandi fyri niðurlopi er fyribyrgdur so væl sum gjørligt. Hetta kann best gerast av **einum** felag, sum er so kapitalsterkt, at tað kann halda teir neyðturvuligu »fagmenn« — verkfrøðingar — at leiða arbeiðið. Sjálvandi skal Løgtingið ansa eftir, at minudrift so vítt møguligt verður sett á stovn allastaðni í Føroyum, hvar líkindi eru fyri lønandi drift.

Soleiðis síggja vit uppá hesi viðurskifti.

Vit vænta nú, at okkara partamenn framseta teirra hugsan hesum viðvíkjandi annaðhvørt í hesum blaði ella privat til ein av okkum.

J. H. Danbjørg.

Til

FØROYA REVAEIGARAR!

Fyri at fáa revaaling í Føroyum á góða, praktiska leið, at hon kann verða eigarum og landi til gagns, loyvi eg mær hervið at bjóða Tykkum til fundar í Tórshavn friggjadagin h. 17. decbr. kl. 10 fyrrapartin til stovnan av alifelagi - - og samráðingar um skipan. - -

CARL JOHAN BECH,
djóralækni.

Italienskir trolarar til Havnar.

Fyri nakað síðani frættist, at Havnar býráð hevði fingið bræv frá Gismondi, ið ynskti at fáa 5 italskar trolarar »stasjoneraðar« í Havn. Teir ynsktu pláss í landi fyri koli og salti o. ø. Skip skuldi sigla higar eftir fiskinum. Teir bjóðaðu sær til at taka 15 Føroyingar umborð á hvønn trolaran. Tann fiskur, teir veiddu, skuldi ikki koma inn undir kvotan; men hin føroyska italiakvotan skuldi harafturímóti okjast við o. u. $^1/_2$ mill. kr.

Hetta tilboð vakti sjálvandi stóra gleði innanfyri Havnar býráð. Tað var býráðslimunum skiligt, at ein slík fyritøka vildi veita býnum nógv arbeiði — og tað er torvur á. Teir tóku beinan vegin við tilboðnum. Men at greiða spurningin við Føroya Fiskaexport lótu teir Italiamenn um.

Vit frættu sum sagt hesi tíðindini; men vit fingu ikki loyvi at bera tey fram — tað var ikki rætt, at bloðini fingu fatur á hesum, meðan tingingarnar fóru fram. Og vit tagdu.

Men ikki tagdu øll bloðini. Eitt kom stutt eftir við allari søguni. Tað sá næstan út, sum tað hevði ein framíhjárætt!

Nú er svar komið frá Gismondi, og maðurin sjálvur kom í gjárkvøldið við »Dr. Alexandrine« at tingast við »Føroya Fiskaexport«. Men áðrenn svarið er fyrilagt býráðnum, hevur eitt annað blað kunngjørt tíðindini. Tað sær sostatt út til, at einstok bloð eiga framíhjárætt til at bera út tíðindi frá kommunalum hendingum. Men Havnar býráð kann gera sær greitt alt fyri eitt, at vit hereftir ikki ætla at tiga við tíðindum, ið haðani frættast, sjálvt um teir kundu ynskt tað.

Sjálvum trolaramálinum viðvíkjandi tykjast vónirnar at vera ljósar. Tað er neyvan nakað at ivast í, at tingingarnar millum Gismondi og Føroya Fiskaexport fara at føra til eitt gott úrslit.

Café Ydun

verður uppaftur latin í dag, **leygardag 6. november,** og verður opin hvønn dag til kl. 11 um kvøldið.

P. Alberg.